Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Neyð- og menningarhjálp

Spurningar:

1. Hvørjir felagsskapir og verkætlanir hava fingið stuðul til ávikavist neyðhjálp og menningarhjálp í 2020?
2. Hvussu nógvan stuðul hava omanfyrinevndu felagsskapir og verkætlanir fingið játtaðan í mun til upphæddina, ið søkt varð um?
3. Verður øll játtanin brúkt í ár?

Viðmerkingar:
Føroyar lata 9 mió. kr. árliga í stuðli til neyð- og menningarhjálp. Hjálpin verður veitt sambært løgtingslóg frá 2007 um altjóða menningarsamstarv. Endamálið við samstarvinum er føroysk luttøka í altjóða samfelagnum við tí endamáli at minka um ójavnan í heiminum. Landið ynskir at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi til frama fyri menningarlond.

Málsetningurin í hesum arbeiði er : « at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri altjóða menningarviðurskiftum. Tá ið til ber, eiga føroysk vitan og føroyskur serkunnleiki tí at verða gagnnýtt og ment í sambandi við menningarverkætlanir, ið landsstýrið stuðlar.»

Seinastu árini hava føroyskir hjálparfelagsskapir verið virknir í arbeiðinum at veita menningar- og neyðhjálp. Fyri at síggja í hvønn mun játtanin til neyð- og menningarhjálp verður brúkt til at skapa royndir og áhuga fyri altjóða menningarviðurskiftum, sum ásett er í omanfyrinevnda málsetningi, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 16. november 2021

Eyðgunn Samuelsen